LM-078/2023

Fylgiskjal 5

FELAGIÐ PENINGASTOVNAR

Fíggjarmálaráðið
fmr@fmr.fo

Dagfesting
6. februar 2024

Hoyringsskriv viðv. løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá (mál nr. 23/25586)

Felagið Peningastovnar hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Eitt av endamálinum við uppskotinum er at geva, eitt nú, peningastovnum atgongd til p-tølini í Virkisskránni ella við øðrum orðum at heimila Virkisskránni at flýggja peningastovnum p-tøl úr Virkisskránni.

Í § 1, nr. 5 í uppskotinum verður sagt:

> **5.** § 15, stk. 2, verður orðað soleiðis: *"Privat kunnu bert viðgera p-tøl samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum"*.

Orðingin kann geva ta fatan, at her, í lógini um Virkisskrá, verður rætturin sum heild at viðgera p-talið stovnaður.

Til hetta er at viðmerkja, at peningastovnar frammanundan hava heimild at viðgera persóntalið, sbr. § 16, stk. 2 í Dátuverndarlógini:
Dátuverndarlógin § 16, stk. 2:

> *"Stk. 2. Privat kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið:*
> *1) viðgerðin er heimilað í lóg,*
> *2) skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki,*
> *3) treytirnar í § 12 eru loknar, ella*
> *4) viðgerðin bert fer fram til søgulig, vísindalig ella hagfrøðilig endamál."*

Dátuverndarlógin § 6, stk. 1, nr. 2 allýsir viðgerð soleiðis:

> *"Í hesi løgtingslóg er at skilja við:*
> *2) Viðgerð: Øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, goyming, víðarigeving, avhending o.a. ella ein sameining av hesum, líkamikið um henda er automatisk ella ei."*

Mælt verður til at orða § 15, stk. 2 soleiðis, at eingin ivi er um, at p-tøl úr Virkisskránni kunnu flýggjast út til privat (virkir), um so er – ella treytað av – at tey hava heimild at viðgera p-tøl samsvarandi dátuverndarlógini (§ 16, stk. 2 í dátuverndarlógini).

Herumframt hava vit hesar viðmerkingar av meira tekniskum slagi:

Í § 8, stk. 1 verður nr. 12 strikað; í stk. 2 verður nr. 9 strikað og í stk. 3 verður nr. 9 strikað. Í hesum sambandi mangla konsekvensrættingar, soleiðis at nr. 13-16 í § 8, stk. 1 verður broytt til nr. 12-15. Í stk. 2 verða verandi nr. 10-11 broytt til 9-10 og í stk. 3 verður verandi nr. 10 broytt til nr. 9.

Eftir hetta eigur broytingaruppskotið § 1, nr. 4 at verða soljóðandi:

"Í § 8, stk. 1 verður aftaná nr. 16, sum nú er vorðið nr. 15, sum nýggj nummur sett: 16) Eigaraupplýsingar og 17) Roknskaparár."

Latið okkum endiliga frætta um spurningar ella ivamál eru.

Blíðar heilsanir

Jean Djurhuus
formaður